# Almannamálaráðið

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 23. juli 2018 |
| Mál nr.: | 18/00672 |
| Málsviðgjørt: | PL |

**Løgtingsmál nr. xx/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kærunevnd í almanna-, familju- og heilsumálum** (Heimildargrundarlagið broytt frá forsorgarlóg til vælferðarlóg)

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kærunevnd í almanna-, familju- og heilsumálum

(Heimildargrundarlagið broytt frá forsorgarlóg til vælferðarlóg)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 47 frá 23. mars 1993 um kærunevnd í almanna- og heilsumálum, sum broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 28. apríl 2000, løgtingslóg nr. 150 frá 20. desember 2005 og løgtingslóg nr. 78 frá 29. mai 2017 verður gjørd henda broyting:

**1.** § 1, stk. 1, nr. 1 verður orðað soleiðis: “1) løgtingslóg um almannatrygd og vælferð, sbrt. § 71”.

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2019.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Uppskotið er ein fylgibroyting sum avleiðing av, at lógaruppskotið um almannatrygd og vælferð (vælferðarlógin) kemur í staðin fyri galdandi forsorgarlóg (lovbekendtgørelse om offentlig forsorg), og neyðugt er tí at rætta tilvísingina til heimildargrundarlagið í lóg um kærunevnd í almanna-, familju- og heilsumálum samsvarandi.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Í galdandi lóg um kærunevnd í almanna-, familju- og heilsumálum verður § 33, stk. 6 í lov om offentlig forsorg nevnd sum heimildargrundarlag hjá kærunevndini.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið er at rætta tilvísingina til heimildargrundarlagið í § 1, stk. 1, nr. 1 so at hetta samsvarar røttu ásetingini í lóg um almannatrygd og vælferð.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Tilvísingin til § 33, stk. 6 í lov om offentlig forsorg verður broytt til í staðin at vísa til § 71 í løgtingslóg um almannatrygd og vælferð soleiðis, at heimildargrundarlagið samsvarar nýggju løgtingslógini um almannatrygd og vælferð.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur ligið til almenna hoyring á hoyringsportalinum hjá Føroya Landsstýri. Harumframt er uppskotið sent hesum til hoyringar:

Kommunufelag Føroya
Stjórnarráðum við áheitan um at senda til viðkomandi undirliggjandi stovnar
MEGD við áheitan um at senda til limafeløgini
Heilsuhjálparafelagnum
Heilsurøktarafelag Føroya
Føroya Pedagogfelag
Føroya Lærarafelag
Felagnum føroyskir sálarfrøðingar
Ljósmøðrafelag Føroya
Starvsmannafelagnum
Fysioterapeutfelag Føroya
Ergoterapeutfelag Føroya
Sosialráðgevarafelag Føroya
Felagnum Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar
Almannaverkinum
Føroya Kærustovni
Dugna
Sjóndeplinum
Kvinnuhúsinum
Fountainhúsinum
Heilbrigdi

Frælsi
Bláa Krossi
Ráðgevingini fyri føroyingar í Danmark
Arbeiðsloysisskipanini
Dátueftirlitinum
Kriminalforsorgini
Ríkisumboðnum
Føroya Landfúta
Landsfelag Pensjónistanna
Fosturforeldrafelagnum
Vinnuhúsinum
Samtaki
Fakfelagssamstarvinum

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar við sær.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar við sær.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Ongir millumtjóða sáttmálar eru á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið samsvarar Evropeiska mannarættindasáttmálanum og Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

### 2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

### 2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

### 2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

### 2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Uppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**
Tilvísingin til § 33, stk. 6 í lov om offentlig forsorg sum heimildargrundarlag hjá kærunevndini verður broytt til røttu ásetingina í lóg um almannatrygd og vælferð (vælferðarlógin).

**Til § 2**
Gildiskoma.

Almannamálaráðið, 3. juli 2018

**Eyðgunn Samuelsen**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur